## Sjúkrarøktarfrøðiskúli Føroya

**Útbúgvingin til sjúkrarøktarfrøðing byrjar 01. februar 2006.**

**Vilt tú hava eina útbúgving har tú:**

· Fært stórar avbjóðingar, nógvar valmøguleikar og brúk fyri tínum persónligu eginleikum og hollari ástøðiligari vitan

· Hevur nógvar starvsmøguleikar innan alla heilsutænastu og møguleikar fyri at arbeiða uttanlands bæði hjá humaniterum stovnum og øðrum ótraditionellum støðum.

**Upptøkukrøv:**
Atgongugevandi prógv til útbúgvingina av sjúkrarøktarfrøðingum eru:

1. Studentsprógv
2. Hægri fyrireikingarprógv (HF)
3. Hægri handilsprógv (HH)
4. Hægri tøkniprógv (HT)
5. Hægri fiskivinnuprógv (HIF)
6. Prógv úr øðrum londum, ið skúlin metir at vera sambærilig við omanfyri nevndu prógv.

Umsøkjari, ið hevur royndir og/ella útbúgvingar, men ikki fult út lýkur krøvini omanfyri, kann fáa atgongd um so er, at hann hevur í minsta lagi 9 mánaðar arbeiðsroyndir ella aðrar viðkomandi royndir umframt prógv á miðnámsskúlastøði í lærugreinunum:

· Føroyskt
· Danskt á B støði ella annað norðurlenskt mál á sama støði
· Enskt á B støði
· Evnafrøði á B støði ella lívfrøði á B støði
· Samfelagsfrøði á C støði ella sálarfrøði á C støði

Harumframt krevur skúlin grundskeið í fyrstu hjálp, og verður skipað fyri skeiði áðrenn skúlin byrjar.

Umsóknarbløð og nærri upplýsingar fáast við at venda sær til Sjúkrarøktarfrøðiskúla Føroya, Eirargarður 14 B, 100 Tórshavn, tlf. 31 59 50 ella 30 45 99 lok. 1180 ella um heimasíðuna www.srfs.fo

Umsóknin skal vera skúlanum í hendi í seinasta lagi týsdagin 1. november 2005 kl. 14.00

Sjúkrarøktarfrøðiskúli Føroya

EIRARGARÐUR 14B · FO-100 TÓRSHAVN · TEL 31 59 50 · FAX 31 39 26 · SRFS@SKULIN.FO

## ALV søkir eftir starvsfólki

**Arbeiðsuppgávurnar verða í høvuðsheitum**

- at gera ymiskar skrivligar uppgávur, so sum ráðleggingarskriv viðv. næmingunum á ALV og mannagongdir
- at hava samrøður við næmingar, ið arbeiða á ALV, tá tørvur er á tí
- at traðka til fyri starvsfólkið á teimum ymisku eindunum, sum eru á ALV í Smiðjugerði, tá tørvur er á tí (tað kann verða t.d. vegna sjúku, fundarvirksemi o.l.)
- hjálpa til við ymiskum fyrifallandi

Broytingar kunnu koma í starvsuppgávurnar.

Tá talan er um at traðka til á eindunum verður hugsa um

- at finna áhuga og førleika hjá næmingunum. At menna, upplæra og geva næmingunum vinnuligar royndir, sum eru at javnmeta við vanlig arbeiðskor.
- at læra næmingarnar ymiskar uppgávur á eindunum og vera við til at geva gerandisdegnum innihald.

**Førleikakrøv**

- hóskandi útbúgving
- góðan skriviførleika
- evnir at samstarva, eisini við aðrar fakbólkar
- dugir at síggja møguleikar heldur enn avmarkingar
- evnir at læra frá sær
- ert hugskotsfullur, kreativur og positivur

**Vit bjóða**

- spennandi arbeiði, har góðir møguleikar eru fyri ávirkan

**Løn og setanartreytir**

- starvið er fulla tíð
- starvið hevur tilvísing til deildarleiðaran
- løn sambært avtalu millum Fíggjarmálaráðið og Starvsmannafelagið
- starvið verður at seta 1. nov. 2005 ella skjótast tilber.

Meira fæst við at vita um starvið við at venda sær til: Guðrun Guðjónsson, deildarleiðara á tlf. 350072 ella 253200.

**Umsóknir skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi 15. okt. 2005**
Umsókn saman við prógvi, royndarváttan v.m. skal sendast til:

**Sjálvsognarstovnurin ALV**
Smiðjugerði 6. kj.
Postboks 301
110 Tórshavn

Brævbjálvin skal viðmerkjast »umsókn«.

## Reingerðingsfólk /avloysari

### til Barnagarðin Eikilund í Vági

Søkt verður eftir reingerðingsfólki/avloysara til barnagarðin Eikilund at byrja sjótast tilberð.

**Setanartreytir:**
Talan er um reingerðing 2 tímar um dagin, og at verða avloysari fyri starvsfólkið.

Starvið er lønt samsvarandi sáttmála millum Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya og avvarðandi fakfeløg.

Meira fæst at vita um starvið við at venda sær til Unn Michelsen tlf. 373383.

Umsóknin saman við upplýsingum um útbúgving og royndir skal vera Vágs kommunu í hendi í seinasta lagi 16. oktober 2005.

Umsóknin skal sendast til:

**VÁGS KOMMUNU**
**Fo-900 VÁGUR**
Viðm. reingerðingsfólk/avloysari

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:**

**Skrásetingar-nr. Sp/f 813,** Sp/f Leivur Nattestad, 370 Miðvágur.
**Partapeningur:** Lækking við kr. 301.698,00 til kr. 80.000,00 viðtikið kr. 06.04.2005,er nú endalig.
**Kapitalur:** kr. 80.000,00

*Skráseting Føroya*
*tann 27. september 2005*

*Kristin Balle*

LEIGA
AMBOÐ
&
MASKINUR

Kaj Andreasen & Co
BREKKUTÚN 7 · 188 HOYVÍK
TEL 31 56 00

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:**

**Skrásetingar-nr. P/F 3698,** P/F Faroe Farming, 900 Vágur.
**Nevnd: Farin úr nevndini:** Arnbjørn Svabo Egholm, Lítlatrøð 6, 100 Tórshavn (nevndarlimur)
Rógvi Pætursson Reinert, Inni á Fløtum, 180 Kaldbak (nevndarlimur)
**Innkomin í nevndina:** Birgir Fonsdal Kass, Torkilsgøta 2, 188 Hoyvík (nevndarlimur)
Hørður Wardum, Hoyvíksvegur 20, 100 Tórshavn (nevndarlimur)

*Skráseting Føroya*
*tann 27. september 2005*
*Kristin Balle*

UTTANLANDS FLYTING
hurð til hurð



Føroyar → Danmark
Danmark → Føroyar
TILBOÐ VERÐA GIVIN
A.K. TRANSPORT · TEL 58 40 40

Toyota Yaris
Árgang 2004 · 10.000 km
til sølu fyri kr. 115.000,-
Telefon 515130